LM-099/2023

Fylgiskjal 19

Gjógv hin 21. februar 2024.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Stílað: Høgna Hoydal, landsstýrismanni

Viðmerking til uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin).

Tað er gott, at tað er komið eitt uppskot til lóg, sum ásetir, hvussu gongd í haga framyvir skal verða skipað. Vit taka undir við, at føroyingar skulu kunnu njóta føroysku náttúruna og kunnu fara ein túr í hagan. Sjálvandi undir tí fyritreyt, at hetta verður gjørt við skili og uttan at nerva náttúru, fuglalív, seyðin í haganum v.m. Gongd í haga hjá vanliga føroyinginum hevur heldur ikki, tað vit kenna til, verið nakar trupulleiki, og hava vit ikki noktað fólki, sum hava spurt um loyvi at fara í hagan. Viðmerkjast skal, at tey flestu spyrja ikki, og síggja vit heldur ikki tað sum ein stóran trupulleika.

Endamálið við lógaruppskotinum er at skipa ferðavinnuna á burðardyggum grundarlagi til tess m.a. at tryggja vinnumøguleikar hjá fólkinum kring landið, og eru niðan fyri nevndu atlit tikin fram:

1) verja náttúru, tilfeingi og siðvenju

2) styrkja staðbundin samfeløg, mentan og mentanararv

3) styrkja samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur, og við at

4) kunna um, hvussu farast skal fram í náttúruni, og hvussu ferðavinnan er skipað.

Eftir okkara tykki tekur lógaruppskotið ikki nøktandi atlit at áhugamálunum hjá fólkinum kring landið – serstakliga á bygd.

Vísandi til § 3 í uppskotinum er einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs – at ganga í haganum. Men sambært § 5 stk. 1, kann *handilslig ferðavinna* bara útinnast í samráð við eigara ella brúkara. Tó kann eigari sambært § 3 stk. 2 ikki nokta fyri handilsligari ferðavinnu í haganum.

Í serligu viðmerkingunum til § 3 verður tilskilað , at endamálið við ásetingini um samráð við eigarar og brúkarar er at geva hesum høvi til annaðhvørt at boða frá, at tað ikki ber til ávísan dag vegna t.d. fjallgongu ella haruveiðu, at tiltakið má vera fyrr ella seinni á degi, ella at gangast má eina aðra leið. Kravið um, at slíkt virksemi bara kann útinnast í samráð við eigara ella brúkara, gevur ikki hesum rætt til at nokta fyri slíkum virksemi uttan so, at hetta órógvar annað virksemi, t.d. fjallgongu.

Handilsliga ferðavinnan hevur sostatt eftir lógaruppskotinum – uttan samsýning til hagan – sama rætt til hagan sum hagin sjálvur – tó undantikið fjalldagar og harudagar.

Handilslig ferðavinna er sambært allýsing í lógaruppskotinum skipaður túrur, har luttakarar gjalda fyri tiltakið. Sostatt kunnu ferðaskrivstovur o.l. krevja eitt gjald frá teimum ferðandi fyri at hava skipað fyri einum túri í hagan. Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um, hvat hetta gjaldið til ferðaskrivstovurnar kann vera. Hagin kann ikki taka eitt gjald fyri tiltakið, sum verður fyriskipað í haganum.

Hetta fer ikki at eggja til at menna samstarv millum haga og ferðasmiðir, so endamálið við lógini at styrkja staðbundin samfeløg og at styrkja samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur, kann verða rokkið – tvørturímóti.

Sambært § 6 skulu allar kommunur saman við serstøku ella staðbundnu nevndini og í samráð við eigara ella brúkara, gera eina ferðavinnuætlan, sum skal skipa ferðavinnuna á skynsamasta hátt.

Ásetingarnar geva eigara og bygdarfólkinum møguleika at ávirka, hvussu handilsliga ferðavinnan verður skipað innan fyri bygdar- og kommunumark. Hetta er sum útgangsstøði gott, og tey staðkendu og tey, sum eiga jørðina og hagarnar, hava við hesum møguleika at ávirka t.d. gongd í haga, so hetta sum minst ávirkar náttúru, fuglalív, seyðahald, og at tikið verður atlit til trygdina v.m.

Tá ferðavinnuætlanin er gjørd, er frítt hjá handilsligu ferðavinnuni (í veruleikanum einum og hvørjum) at skipa fyri ferðing og gongd í haganum sambært ætlanini, sum løgd er.

Hetta skal gerast sambært eini standardavtalu, sum landsstýrismaður ger. Tá vit lósu uppskotið, hugsaðu vit, at við hesari standardavtaluni skulu hagar kunna gera avtalur við ferðaskrivstovur, ferðaleiðarar og onnur í ferðavinnuni um túrar, og at hagin fær eitt ávíst gjald frá teimum fyri hetta. Sum skilst, er ætlanin kortini ikki, at standardavtalan skal hava nakra áseting, sum ásetir eitt ávíst gjald fyri nýtslu av ognini.

Tað tykist ikki greitt, hvønn handilsliga ferðavinnan skal gera [standard]avtalu við – landsstýrið ella teir einstøku hagarnar. Landsstýrismaðurin ger avtaluna, men hagarnir kunnu krevja eina avtalu – í báðum førum er eftir lógaruppskotinum talan um somu avtalu.

Er her talan um eina generella og yvirskipaða avtalu, sum handilsliga ferðavinnan ger við myndugleikarnar, ella er talan um eina avtalu, sum handilsliga ferðavinnan ger við hagarnar, men sum landsstýrið skal góðkenna ?

Havandi í huga, at handilsliga ferðavinnan sambært § 3 og § 5, og sum er neyvari tilskilað í viðmerkingunum til lógartekstin, kortini hevur fría atgongd til hagan, kann man loyva sær at ivast í nyttuni av eini slíkari avtalu. Hetta er ikki annað enn at kamuflera, at handilsliga ferðavinnan kortini hevur fría atgongd til hagarnar – og sambært lóg uttan at skula lata eigarunum samsýning.

Tað hevur verið ført fram, at ferðavinnan skal skipast soleiðis, at fyri at kunnu taka eitt gjald, eigur ein tænasta at verða veitt. Umstøðurnar í nógvum av smáu bygdunum eru soleiðis, at tey flestu, sum búgva har, eru komin væl til aldurs og hava ikki møguleika at vera ferðaleiðarar og annars taka lut í ferðavinnuni. Hagarnir, sum vit umboða, eru ognarhagar norðuri við Gjógv. Viðmerkjast skal, at øll jørðin við Gjógv er ognarjørð – einasta bygd í landinum har hetta er galdandi – og ognin er smábýtt. Tí kann ongin liva av tí, sum jørðin gevur, og í bygdini er bara seyðahald. Eigararnir mugu sum øll onnur hava annað arbeiði fyri at hava eina inntøku, og tí eru avmarkaðir møguleikar aktivt at luttaka í ferðavinnuni.

Er ætlanin við lógini og ætlaðu standardavtaluni rætt skilt, fáa eigararnir bert møguleika umvegis ferðavinnuætlanina at ávirka – ikki avgerða – hvussu útferðir í haganum verða skipaðar, og so er "frítt fram" hjá vinnuligu ferðavinnuni uttan samsýning at nýta ognina/hagarnar.

Tann, sum skipar fyri eini [út]ferð, kann frítt taka eitt gjald frá teimum ferðandi – tað er ein spurningur millum tey ferðandi og fyriskipara. Vit taka sum nevnt undir við, at tey sum virka í vinnuni og veita tænasturnar, skulu fáa meginpartin av gjaldinum, sum tey ferðandi gjalda. Leyst av hesum gjaldinum mæla vit til, at tað í standardavtaluni er ásett eitt gjald fyri hvønn ferðandi, sum verður latið haganum. Eitt slíkt gjald er fyri slit av haganum og fyri at umsita ognina.

Er onki slíkt gjald, hava eigararnir, sum í allar flestu førum eisini eru bygdarfólk ella hava ættarbond til bygdina, lítlan ella ongan áhuga í at skipa ferðavinnuna, tí teir, eftir at hava skipað hana, bert verða áskoðarar til ta vinnuligu ferðavinnu, ið verður rikin á ognini og uttan at fáa nakað ískoyti til raksturin av ognini, men fáa bara slitið og tað órógv, sum ferðavinnan hevur á seyðahaldið, fuglalívið v.m.

Hetta verður ikki mett at vera til gagns fyri ferðavinnuna á bygd og als ikki fyri hagan. Tí mæla vit til, at standardavtalan ásetir / loyvir einum gjaldi, sum er millum kr. 50,- og 100,- (ella 10 – 15 % av prísinum) fyri hvørt ferðafólk, ið fer í hagan. Eitt slíkt lítið gjald hevði verið við til at lagt lunnar undir eitt jaligt

samstarv millum ferðavinnuna ?g eigararnar av ?gnini. Er hinvegin ?nki gjald, er vandi fyri, at bygdarfólkið ?g eigararnir verða ónøgd við ferðavinnuna, ?g tað er neyvan til fyrimuns fyri nakran ?g als ikki ferðavinnuna.

Ein slík skipan er ikki fremmand fyri ?kkum – tað er s?leiðis, hagar saman við ferðafyriskiparum (ferðasmiðjum) hava skipað seg seinastu árini. Teir ferðaleiðarar ?g ferðasmiðir, ið vit hava snakkað við, hava ?nki í móti, at eitt slíkt gjald verður avtalað.

Tað hevur verið frammi, at ein vil ikki k?ma í ta støðu, at einstaklingar fara at leggja jørðina í Før?yum undir seg við tí fyri eyga síðani at áseta eitt høgt gjald fyri alla ferðing í náttúruni. Vit skilja hetta sjónarmiðið ?g halda, at tað hevði verið ein óheppin støða. Verður gjaldið hinvegin ásett lágt ?g skal góðkennast av myndugleikanum, verður ikki mett, at vandi er fyri, at hugsaða støðan verður veruleiki. Annars ber til eins ?g í fiskivinnuni at áseta reglur, sum avmarkað miðsavnan av jørðini ?g um útlendskan eigarapart.

Viðmerkjast skal eisini, at støðan í einum ?gnarhaga ?g hjá einum festibónda ikki kann samanberast. Um ein eigari í ?gnarhaganum er ferðaleiðari sjálvur ?g fer í egnan haga sum ferðaleiðari, er tað viðk?mandi eigari, sum fær ferðaleiðarasamsýningina – hagin fær ?nki. Hjá einum festibónda, sum sjálvur fer í hagan, hann hevur fest, er henda inntøka ein partur av inntøkugrundarlagnum hjá festinum ?g styrkir harvið um raksturin á garðinum.

Sum sagt halda vit, at tað er g?tt, at tað er k?mið eitt uppsk?t til lóg, sum ásetir, hvussu g?ngd í haga framyvir skal verða skipað.

Lógaruppsk?tið, sum hevur verið til h?yringar í eina tíð, hevur stóran áhuga millum fólk. Uttan iva fara at k?ma nógvar viðmerkingar, ?g vilja vit k?ma við ?kkara viðmerkingum út frá tí støðu, vit sum óðalsmenn við sera smábýttari ?gn eru í. Vit halda, at uppsk?tið við tillagingum kann gerast g?tt ?g fáa greiðu á tí sera keðiligu støðu, sum hevur valdað l?ngi. Tað er neyðugt at l?ysa hetta málið nú.

Við hesum, eftir ?kkara tykki sakligu viðmerkingum, ynskja vit at ávirka uppsk?tið rættan veg ?g vóna, at lidna lógaruppsk?tið verður eigarum, festarum, ferðavinnuni ?g øllum fólkinum ?g síðst men ikki minst náttúruni til frama.

Vegna hagastýrini í øllum hagapørtunum við Gjógv.

Símun Grønadal

Andras Kristiansen

S?fus Debes J?hannesen

Suni Christiansen

Øssur J?hns?n J?hannesen

Fríðgerð J?ensen